# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Óli fann konu sína í Japan

**Leygardagin 6. november var hugnaløta á Føroya Sjómansskúla í samband við at Óli Olsen signeraði nýggju bókina »Sigling og útbúgving II«. Hetta er seinna bókin, ið hann hevur skrivað um sigling og útbúgving í Føroyum**

MÓTTØKA
*Myndir: Magnus Gunnarsson*



*Aase Bømler Olsen og Óli Olsen. Tey møttust umboð á farmaskipinum Oliviu Mærsk í 1973, har Óli var stýrimaður og hon stewardessa*

Hugnaløtan byrjaði við, at Óli Olsen beyð øllum at vera vælkomin. Hann helt eisini røðu, har hann segði frá ymiskum áhugaverdum upplivingum, bæði meðan hann sigldi úti og í arbeiðinum at savna tilfar til bøkurnar, hann hevur skrivað. Hann segði m.a. frá hvussu hann fann konu sína.

Tað var soleiðis, at tá Óli varð liðugur við skipsføraraútbúgving sína í 1973, fór hann út at sigla við 50.000 tons stóra farmaskipinum »Olivia Mærsk« hja reiðarínum A. P. Møller. Hann fór umborð í Rotterdam. Tá teir komu til Japan, mynstraði Aase, ið seinni gjørdist kona hansara, sum stewardessa við skipinum. Tey komu at kennast har umborð, giftust og búsettust í Danmark, hiðani Aase er ættað.

Í 1979 fluttu tey til Føroya, og Óli fór á lærara-skúla í 1983. Í 1987 gjørdist hann lærari á Føroya Sjómansskúla.

Aase og Óli búgva á Argjum, tey eiga tvær vaksnar døtur, sum í løtuni eru í Danmark í lestrarørindum.

Hilmar Kass, fyrrverandi sjómansskúlalærari, helt ein sera áhugaverda røðu, har hann m.a. segði frá hvussu umstøðurnar vóru, tá hann byrjaði á stýrimansskúlanum í Havn í 1948. Einastu amboðini lærararnir høvdu vóru sekstantur og kumpass. Hann segði eisini frá menningini av skúlanum fram til dagin í dag.

Hilmar Kass var lærari á Føroya Sjómansskúla frá 1969 til 1994.

Nógv fólk vóru komin saman á Sjómansskúlanum hendan dagin, nógvir uppilagstir stýrimenn og skiparar og nógv teirra, sum hava havt við Sjómansskúlan at gera.

Stórur áhugi var fyri nýggju bókini »Sigling og útbúgving II«, sum kom út hendan dagin, og Óli signeraði.



*Tórbjørn Poulsen, fyrrverandi landsstýrismaður, og Jóannes Skaale, fyrrverandi lærari á Sjómansskúlanum*



*Kristian Meitil við harmoniku og Andras Danielsen við gittara spældu á hugnaløtuni*



*Óli Olsen legði fram bókina »Sigling og útbúgving II«. Hann segði í røðu síni m.a. frá ymiskum áhugaverdum upplivingum meðan hann sigldi úti*



*Stórur áhugi var fyri nýggju bókini, sum Óli signeraði. Her eru tað Daniel Johan Poulsen, fyrrverandi stjóri á Sjómansskúlanum, Christian Poulsen, lærari á skúlanum, og Poul Mohr, skipasmiðjustjóri, sum vilja hava eina autograf*



*Tveir fyrrverandi sjómansskúlanæmingar, brøðurnir Benjamin og John Joensen, og Jákup Andreas Arge, sum hevur hjálpt til við myndum til bókina. Aftan fyri síggjast Sonja og Jens Vilheln Danielsen*



*Hilmar Kass, fyrrverandi sjómansskúlalærari, helt ein sera áhugaverda røðu*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúlin í Tórshavn 70 ár:

## Hátíðarhald á Skúlaheiminum

**Í dag, 10. nov. 2004, verður Tekniski Skúlin í Tórshavn 70 ár. Tað var Havnar Handverksmeistarafelag, sum tók stig til at seta skúlan á stovn tann 10. november 1934. Í hesum sambandi verður móttøka á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin**

TÍÐINDASKRIV



*Fíliskúlin byrjaði í leigaðum hølum í Jekaragøtu. Á myndini er tríggir av stýrislimunum, f.v.: Leif Mohr, Absalon Eysturoy og Helgi Øster*

Millum teirra sum tóku stig til skúlan vóru Vilhelm Nielsen, smiðjumeistari, og Johannes Simonsen, múrarameistari.

Fyrsti fyristøðumaður var Johannes Simonsen, og Vilhelm Nielsen var fyrsti stýrisformaður.

Í 1935 var skúlin statsgóðkendur, og rindaði staturin 40 prosent til rakstурin.

Áhugavert er at nevna í hesum »samanleggingartíðum«, at í 1945 bjóðaði Tórshavnar býráð Tekniska Skúlanum í Tórshavn húsini hjá V.B.V. til undirvísingarbrúk. Treytin var tó, at har skuldi eisini Føroya Studentaskúli fáa húsrúmd. Sostatt kann sigast at spírin til »Skúladepilsætlanina« helst var »kjølfest« longu tá, fyri knøppum 60 árum síðani.

Í dag eru umleið 200 ársnæmingar á skúlanum. Av tí at ein stórur partur av næmingunum eru lærlingar, sum partvís eru á læruplássinum og partvís eru í skúla, hava umleið 500 lærlingar og næmingar tilknýti til skúlan.

Umleið 70 fólk starvast á Tekniska Skúlanum í Tórshavn, og svarar hetta til umleið 55 ársverk.

Tekniski Skúlin í Tórshavn er sum kunnugt ein av teimum trimum skúlunum, sum í framtíðini skal húsast í Skúladeplinum við Marknagilsvegin, og sær Egon Øregaard, skúlastjóri, hetta sum eina sera framkomna hugsan við nógvum møguleikum fyri teimum ungu sum í framtíðini hava ætlanir um at fáa sær eina útbúgving í Føroyum.

Somuleiðis eru stórir møguleikar hjá høvuðsstaðarkommununi at fáa eitt virkið skúla og útbúgvingarumhvørvi í høvuðsstaðnum, har eisini mentanarlívið kann fáa bestu karmar at virka undir.

Mikudagin 10. november frá kl. 15-17 verður almenn móttøka á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin, har m.a. landsstýrismaðurin í Mentamálum kemur at bera fram eina heilsan. Eisini verður eitt snotuligt 70 ára føðingardagsrit lagt fram undir móttøkuni. Myndirnar eru úr føðingardagsritinum.



*Fyrsta verkliga undirvísingin var innan hárfríðkan. Hendan undirvísingin byrjaði í kjallaranum á skúlaheiminum í Kongagøtu*

## Eisini ein hálvsystir



*Elisabeth Johansen var hálvsystir til hini átta á myndini*

Síðan greinin um sjey systkin, ið vóru og vitjaðu yngsta beiggja teirra, Poul, sum fylti 60 ár, stóð í Sosialinum, (nr. 212 frá 5. november 2004), er eitt ískoyti komið, um at tey 8 systkini eisini áttu eina hálvsystir, Elisabeth, sum doyði í 1985.

Frágreiðingin er tann at pápi Poul, Jens Olsen, giftist við Elisabeth Poulsen av Eiði, og fingu tey oman fyri nevndu Elisabeth saman. Hon fekk sama navn sum mamman, ið doyði á barsilssong, tá hon varð fødd.

Hendan Elisabeth giftist við Arna Johansen av Tvøroyri, har tey búsettust. Tey fingu níggju børn saman. Elisabeth doyði í 1985, 63 ára gomul.

Jens giftist upp aftur við Josefinu Matras, ið var ættað frá Gjógv. Hon var mamma til tey átta systkini á myndini.



*Átta systkin avmyndað saman fyri fyrstu ferð nakrantíð: Frá vinstru: Jákup Matras Olsen, Trongisvágur, Jastrid Dragsten, Keypmannahavn, Maria Eliasson, Keypmannahavn, Poul Olsen, Rødbyhavn, Óli Jákup Olsen, Trongisvágur, Cederfelt Olsen, Tvøroyri, Solveig Lowe, Darlington, England og Tórolvur Mohr Olsen, Sandur*

†

**Malmberg Simonsen**
**Sørvágur**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
6. november, 84 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
mikudagin 10. november kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju
hósdagin 11. november kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*

**Herborg,
Karin, Mikkjal, Daniella og Esmar**

Tey, ið vilja minnast Malmberg, kunnu lata einkjugrunninum eina peningagávu, konto í peningastovnunum

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Turid Maria Hansen**
**Tórshavn**
**ættað úr Klaksvík**

doyði og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á Lágargarði.
Tøkk til prest, kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur og kransar, og til tykkum,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Elsa, Asbjørn og Páll**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg
á 80 ára føðingardegnum 17. oktober.
Takk fyri gávur, blómur, fjarrit og heilsanir.

**Leivur Joensen**
**Sandavági**

### Dagurin

**10. oktober. Luther.** Sjálvandi ikki komin í álmanakkarnar sum halgimenni, men dagurin er í luthersku kirkjuni settur sum minningardagur hansara. Hann varð borin í heim 10. november 1483 í Eisleben í Týsklandi.